UTTAN ÚR HEIMI

## Nógvir skógareldar

Tað er ikki ber í Fraklandi, at sløkkiliðsmenn stríðast við at fáa tamarhald á skógareldum. Í Portugal er sama skilið.

Portugisisku myndugleikarnir siga, at tvey fólk doyðu í einum skógareldi har norðuri í landinum. Annar maðurin tók lut í sløkkiarbeiðinum, og hin varð funnin deyður við síðina av bili sínum. Skógareldurin hevur serliga herjað í fjøllunum Serra do Acor, og myndugleikarnir hava sent 500 sløkkiliðsmenn og 600 hermenn at basa eldinum. Teir hava einar 150 sløkkiliðsbilar, tyrlur og flogfør. Ein partur av útgerðini er fingin til vega úr Spania.

Tað hevur verið sera turt har norðuri í Portugal í summar, og hitin hevur ligið upp ímóti 40 stigum. Seinastu dagarnar hevur tað verið heldur meiri vindur, og tað ger sløkkiarbeiðið uppaftur truplari.

## Færri vitja USA

Færri og færri fólk velja at fara til USA at vitja. Í 2001 søktu 10,4 milliónir fólk um innferðarloyvi til USA, men í fjør var talið 8,3 milliónir, skrivar blaðið Christian Science Monitor. Blaðið veit eisini at siga, at 68 prosent av teimum, sum bóðu um innferðarloyvi í fjør, fingu játtandi svar. Tí vitjaðu 5,7 milliónir fremmandafólk USA í fjør ímóti meiri enn átta milliónum árið fyri.

Í dag herða amerikansku myndugleikarnir innferðarreglurnar. Eitt av teimum nýggju tiltøkunum ber í sær, at næstan øll, sum søkja um innferðarloyvi til USA, noyðast á amerikansku sendistovuna í heimlandinum til eina samrøðu fyrst.

Ein kanning hjá kanningarstovuni hjá kongressini hevur avdúkað, at nógv útlendsk ungfólk, sum ætla sær til USA á hægri skúlar, fáa ikki innferðarloyvi. Tað hava amerikonsku lærustovnarnir eisini fingið sviðan av. Millum annað verður sagt, at tað útlendska luttakaratalið á teimum sokallaðu summarskúlunum er 30 prosent minni í ár, enn tað plagar at vera.

## Ikki í skúla við turriklæði

Danski Fólkaflokkurin ætlar sær nú at skipa so fyri, at børn og ung skulu ikki sleppa í skúla við einum høvuðklæði, sum hevur samband við teirrav mentan. Ætlanin hjá flokkinum umfatar millum annað turbanir, turriklæði og jødiskar kalottar.

Men tann stóri stjórnarflokkurin, Vinstri, vísir hugskotinum aftur. Birthe Rønn Hornbech, sum er framsøgumaður floksins í rættarmálum, sigur við Jyllandspostin, at tað kemur ikki upp á tal at seta eitt tílíkt forboð í gildi, tí tað stríðir ímóti teirri donsku hugsjónini um frælsi hins einstaka, sigur hon. Birthe Rønn Hornbech sigur, at politikararnir eiga ikki at leggja seg út í, at fólk nýta ávís klæði, sum hava samband við teirra átrúnað.

Frakland og Turkaland hava tílíkt forboð, og Danski Fólkaflokkurin sigur, at hann fer nú at kanna skipanina har fyri at vita, um hon ikki kann setast í gildi í Danmark eisini.

## Færri ganga í kirkju

Ein uppgerð hjá norsku kirkjumyndugleikunum vísir, at færri norðmenn ganga í kirkju nú enn fyrr.

Uppgerðin samanber talið á kirkjugangarunum í 1998 og í 2002, og hon vísir, at í fjør vóru 5.156.170 fólk til guðstænastu í teimum norsku kirkjunum. Fýra ár frammanundan var talið umleið 300.000 størri. Øystein Ingar Larsen, sum er biskupur í Hålogalandi, heldur kortini ikki, at talan er um nakra kreppu, men hann ásannar, at gongdin setir størri krøv til kirkjuna.

Uppgerðin hjá myndugleikunum vísir, at afturgongdin umfatar øll biskupadømini uttan Stavanger. Har vóru 3,5 prosent fleiri fólk í kirkju í fjør enn í 1998. Í høvuðsstaðnum Oslo var afturgongdin 10,2 prosent.

# Ozonlagið minkar ikki so skjótt longur



**Nýggjar kanningar vísa, at ozonlagið kring Jørðina minkar ikki so skjótt, sum tað hevur gjørt. Tað kann vera byrjanin til, at tað fer at menna seg aftur.**

UMHVØRVI
*Árni Joensen*

Nú bendir alt á, at tjúgu ára altjóða arbeiði at bjarga ozonlagnum, sum verjir okkum ímóti teimum ultraviolettu strálunum frá Sólini, hevur givið úrslit. Ein nýggj kanning vísir, at tann parturin av ozonlagnum, sum er millum 34 og 45 kilometrar uppi í atmosferuni, er minkaður minni síðani 1997 enn frammanundan.

– Hetta er byrjanin til, at ozonlagið verður lekt, sigur Michael Newchurch, sum er professari á lærda háskúlanum í Huntsville í USA. Hann hevur staðið á odda fyri kanningini, sum hevur tikið saman um mátingar, sum fylgisveinar og tól á Jørðini hava gjørt seinastu tjúgu árini.

– Mátingarnar vísa, at vit fáa ikki meiri ozon, men tær vísa, at lagið minkar ikki so skjótt longur. Eg vænti, at vit fáa meiri klor, sum oyðileggur ozonlagið, í atmosferuna, enn vit hava nú, men vøksturin er minkaður nógv. Tí vænti eg, at vit fara at síggja ein munagóðan bata í ozonlagnum í komandi árum, sigur professarin í Huntsville.

Granskarar hava leingi víst á, at tað eru serliga tey sokallaðu CFC-gasssløgini og freon, sum oyðileggja ozonlagið, og í 1985 kom ein altjóða samtykt, sum setti forboð fyri at nýta tey skaðiligu evnini. Síðani er forboðið hert fleiri ferðir, og nú bendir tann fyrsta kanningin á, at hetta hevur givið úrslit.

# Ein helvitis marra

**Amerikanski varauttanríkisráðharrin, John Bolton, sigur Norðurkorea vera eina helvitis marru.**

NORÐURKOREA
*Árni Joensen*

Tað er ikki á hvørjum degi, at ráðharrar umrøða annað land sum eina helvitis marru, men tá gjørdi amerikanski varauttanríkisráðharrin, John Bolton, tá hann fyrradagin var í suðurkoreanska høvuðsstaðnum Seoul. Marran var grannalandið Norðurkorea.

Í einari røðu legði John Bolton Norðurkorea undir at hava sett ferða á kjarnorkuvápnaverkætlanina hetta seinasta árið, og hann ávaraði stýrið í Pyongyang ímóti at nýta kjarnorkuhóttanina sum eitt amboð til at leggja trýst á USA við.

– Teir dagar, tá Norðurkorea kundi nýta trýst, eru farnir. Kim Jong-il eigur ikki at halda, at hann kann tryggja seg betur við at útvega sær kjarnorkuvápn. Veruleikin er tað beint øvugta, segði John Bolton.

Hann gjørdi eisini greitt, at tað er Norðurkorea, sum ger av, hvussu stríðið um landsins kjarnorkuvápnaverkætlan skal enda. Sama hvørja leið landið tekur, so eru USA og tess sameindu til reiðar, segði amerikanski varauttanríkisráðharrin.






*Tað var timburmonnunum fyri at takka, at stórskaði ikki hendi á skúlanum í Kaldbak. Teir fingu sløkt eldin longu áðrenn sløkkiliðið var á staðnum.*

*Mynd: Jens K. Vang*

# Kundi endað galið

**Tað var timburmonnunum at takka fyri, at tað ikki hendi stórur skaði á skúlanum í Kaldbak fyrradagin**

ELDUR
*Rógvi Borðoy*

Kaldbaks skúli hevur verið undir útbygging eina rúma tíð, og arbeiðið er nærum liðugt. Útbyggingin fevnir um fleiri nýggjar skúlastovur og eitt felagsrúm, soleiðis at skúlin nú lýkur øll krøv, ið eru sett, í nógv ár framyvir.

Tað kundi alt endað galið fyrradagin. Arbeiðsmenninir høvdu sveisað papp í takinum, tá onkur teirra varnaðist royk. Teir ringdu beinanvegin til sløkkiliðið í Havn, sum vóru á staðnum 12 minuttir seinni, og tá var eldurin longu sløktur, sigur Heiðrikur Kristiansen, sløkkiliðsmaður, sum var á staðnum.

Tað var eitt starareiður, sum eldur var komin í. Reiðrið var sera turt, og brendi væl, og Heiðrikur Kristiansen sigur, at tað eru timburmonnunum fyri at takka, at stórur skaði ikki hendi.

- Tað kundi verið álvarsligt. Eg vil siga at teir bjargaðu skúlanum. Teir bóru seg ógvuliga skjótt at, og eg vil geva alla æru til timburmenninar, at eingin roykskaði ella nakað hendi, sigur Heiðrikur Kristiansen.

### Ein nýggjur skúli

Útbyggingin hevur kostað umleið tríggjar og eina hálva millión krónur, og skúlin skal takast í nýtslu um jóltíðir, sigur Hans Lyngsø frá byggideildini í Tórshavnar kommunu.

Higartil hava næmingarnir fingið undirvísing í nøkrum fyribils skúlastovum í bygdini, so í ringasta føri hevði borið til at hildið undirvísingini í bygdini.

# Einki fóður til laksin

**Eingin fóðrar fiskinum í aliringunum hjá Atlantic Seafarms í Vágsfirði. Tað hava vágbingar lagt til merkis, og spurt seg sjálvan, um tað er djórplágarí ella ikki**

ALING
*Rógvi Borðoy*

Eingin hevur fóðrað fiskin, sum svimur í ringunum hjá Atlantic Seafarms í tvær vikur, og líkt er til, at tað ikki verður fóðrað fyribils. Tað sigur Christian Andreasen, nevndarformaður í Atlantic Seafarms.

Fólk hava í hesum sambandi vent sær til okkum, fyri at vita, um fiskurin skal hungrast til deyðis ella hvat skal henda við honum.

- Fiskurin verður ikki brúktur til framleiðslu av matvøru, og tí er eingin grund til at fóðra hann, sigur Christian Andreasen. Fiskurin skal slaktast skjótast gjørligt.

Hann sigur seg hava spurt fakfólk, og tey hava sagt honum, at tað er fult forsvarligt at gevast við at fóðra upp til ein mánað.

### Djóralæknin

Bjørn Harlou, landsdjóralækni, sigur, at tað er torført at meta um júst hetta dømið. Hann sigur seg vanta nøkur tøl, áðrenn tað kann staðfestast, hvørt tað er forsvarligt ella ei. Men hann sigur, at fiskur hevur eitt lægri stoffskifti enn súgdjór, og at tað ikki kemur undir djóraplágarí at gevast við at fóðra nakrar vikur.

Tað sama siga teir á P/F Fiskaaling. Fiskur etur sera sjáldan, og tá hann etur, eru tað stórar máltíðir.

Tí er eingin orsøk at stúra, tí tað er vanlig framferð, um fiskurin ikki skal slaktast til matna.